*Framhald av síðu 19*

*sigi eg tykkum: Fellur ikki hveitikornið í jørðina og doyr, tá er og verður tað einsamælt; men doyr tað, tá ber tað miklan ávøkst«.* (Jóh. 12,24).

Tað er andlit til andlits við krossdeyðan, at Jesus tulkar deyða sín við eini mynd frá náttúruni, myndini av hveitikorninum, sum verður lagt í jørðina og doyr og ber miklan ávøkst. Jesus er tað *sanna* hveitikornið, sum verður lagt í jørðina og doyr, og deyði hansara ber miklan ávøkst. Hansara deyði hevur alheims týdning.

Við myndini av hveitikorninum talar Jesus ikki einans um deyða sín, men eisini um uppreisn sína *páskamorgun,* ið er hæddin í alheimssøguni, ið gongur frá skapanini til søgunnar enda, tá Guds ríki, ið er ævegis úr framtíðini, upprennur sjónligt í dýr og mæti. Hveitikornið, henda tætta og máttmikla kjarnin, doyr, men skapar samstundis loyndum nýtt lívl. Flutt yvir á føroysk viðurskifti: Seteplið, sum um várið verður sett niður í ta vátu og døkku moldina, doyr og rotnar, men um heystið koma nýggj og frísk epli uppaftur úr moldini. Í deyðanum er lív og gróður og nýggj frukt.

## Fedrarnir eins og hveitikorn

Tað er *vísdómur* í hveitikorninum. Hveitikornið kann eisini nýtast um forfedrar okkara og um okkum sjálv. Fedrarnir hvíla undir grønari túgvu, men bera tó miklan ávøkst. Hvat vóru vit sum ætt, einstaklingar, tjóð og samfelag uttan fedrarnar, uttan teirra arbeiðssemi, hegni og royndir, bæði á sjógvi og landi. Vit standa á fedranna herðum.

Eins og forfedrarnir eiga vit við at bera ávøkst. Tað gera vit við at virða ættarbandið og fjálga um fedranna arv, har tað kristiliga og gerandisliga varð samantvinnað, og við sjálv at nýta orku, vit og skil á øllum økjum, bæði samfelagnum, tjóðini og komandi ættarliðum at frama.

Tað er av sonnum vísdómur í hveitikorninum. Henda vísdóm lýsir Heðin Brú meistarliga í »Fedranna talu«:

*»Grein honum lutir, ið ættin kosti til stavnhald:*
*Lívføri títt er slektin, tey sum í mold liggja.*
*Komu tey stutt ella longur, tú skalt víðari byggja.*
*Lívlát er ikki deyðin,*
*lívlát er hetta at seta førningin av sær við vegin,*
*tað sum frá fedrunum goymdist og sum tú sjálvur søkti, meðan tú førkaði fótin.*
*Sonurin tekur aftur viðføri títt at bera*
*longur fram á vegin«.*

## Út um sjónarringin

Myndin av hveitikorninum, sum fellur í jørðina, doyr og ber miklan ávøkst, røkkur út um sjónarringin. Hveitikornið boðar frá eini framtíð og einum veruleika handan ytstu sýn. Eins og hveitikorn verða vit løgd í jørðina, men í deyðanum er lív og gróður og nýggj frukt. Ella sagt við orðunum hjá munkunum, tá teir syngja í kleystrinum: *»de morte transire ad vitam«, »at fara frá deyða til lívs«.* Hetta gerst lutur okkara og fedra okkara hin stóra uppreisnarmorgun.

## Tá grøvin tyrvd er vaggar aftur

Er tað sátt at hvørt menniskja leitar aftur til upphav sítt og spyr eftir samleika (identiteti), er tað eins sátt at hvørt ættarlið byggir á annað. Tað er sum Grundtvig sigur: *»Når graven kastes, vuggen gynger«, »tá grøvin tyrvd er, vaggar aftur«.* Og á hesum serstaka degi gjørdist tað okkara lutur, at minnast undanfarin ættarlið við virðing og tøkk og hitta ættarfólk og skyldfólk fyri at læra tey betur at kenna. Tað var eisini *endamálið* við hesi ættarstevnu, nú Innistovuættin er savnað.

Við ynskjum ein góðan, ríkan og hugnaligan dag.




*Tey finna sína ættargrein*



*Nógv ung úr Føroyum og úr Danmark høvdu leitað sær til Klaksvíkar*